# Spæla upp á okkara ringu samvitsku

**- Myndugleikarnir í Føroyum rakna ikki við fyrr enn foreldur at børnum við serligum tørvi sláa nevan í borðið og siga, at tey ikki eiga uppgávuna at taka sær av sínum børnum, tá ið tey eru vaksin. Spurningurin er bara, hvør ger tað yvir fyri sínum barni. Tí spæla myndugleikarnir upp á okkara ringu samvitsku, sigur Doris Hansen, forkvinna í Meginfelag teirra Brekaðu**

BÚSTAÐIR
*Turið Kjølbro*


*Doris Hansen, forkvinna í Meginfelag teirra Brekaðu*

Í Føroyum hava foreldur altíð tikið sær av sínum børnum, uttan mun til aldur ella brek. Úti um landið búgva tí nógv vaksin børn við serligum tørvi heima hjá sínum aldrandi foreldrum, tí ongin annar bústaður er til teirra. Eingin áseting í føroyskari lóggávu sigur, at tað almenna hevur skyldu at útvega bústað til allar borgarar landsins, heldur ikki, um serligur tørvur sum sálarligt ella likamligt brek ger seg galdandi. Hóast tað í forsorgarlógini er ásett, at tað almenna skal hjálpa teimum, sum hava hjálp fyri neyðini.

– Aðra staðni er heilt vanligt, at børn flyta heimani frá, tá ið tey verða 18 ár. So er ikki í Føroyum. Her verða børn hangandi heima nógv longri, tí einki bústaðartilboð er til teirra, sigur Doris Hansen, forkvinna í Meginfelag teirra Brekaðu.

Skulu fólk við serligum tørvi, annað hvørt tey eru brekað sálarliga ella likamliga, hava eitt virkið sjálvstøðugt lív, mugu tey búgva fyri seg sjálv ella saman við øðrum. Men tað er ikki bara uppgávan hjá tí almenna at síggja til, at bústaðir eru til øll.

– Tað kundi staðið í lóggávuni, at tað almenna hevur skyldu til at taka sær av fólki, sum ikki megna tað sjálvi, bæði tá ið tað snýr seg um bústaðir, arbeiðsmøguleikar og annað. Men eftir mínum tykki er tað líka so nógv uppgávan hjá kommununum at útvega bústaðir, eins og fakfeløgini kundu útvegað sínum límum góðar og bíligar íbúðir. Øll bíða eftir, at landið skal útvega bústaðir, men tað er í kommununum hesi fólkini og teirra avvarðandi búgva, sigur Doris Hansen.

Orsøkin til, at tað gongur lættari og skjótari at útvega fólki við serligum tørvi bústað í øðrum londum, er, at har duga foreldur betur at siga frá. Har hava foreldur ikki skyldu at forsyrgja sínum børnum, tá ið tey gerast 18 ár.

– Tað almenna hevur altíð skúgvað sær undan ábygdini.

Myndugleikarnir í Føroyum rakna ikki við fyrr enn foreldur at børnum við serligum tørvi sláa nevan í borðið og siga, at tey ikki eiga uppgávuna at taka sær av sínum børnum, tá ið tey eru vaksin. Gjørdu tey tað, høvdu nógv einki stað at vera. Spurningurin er bara, hvør ger tað yvir fyri sínum barni ella systkini. Tí spæla myndugleikarnir upp á okkara ringu samvitsku. Tað er sera ringt at fáa broytt hesi viðurskifti, sigur Doris Hansen.

## Serlóg

Í Almanna- og heilsumálastýrinum verður nú arbeitt við at gera eina lóg fyri brekað, har rættindi teirra verða allýst.

– Tað er avgjørt nakað nýtt, at serlóg verður gjørd fyri brekað. Tí er hugsandi, at rætturin hjá brekaðum til bústað verður staðfestur í lóggávuni, sigur Doris Hansen.

Fyri hálvum øðrum ári síðani varð álit skrivað um bústaðarviðurskifti hjá brekaðum í Føroyum. Álitið lýsir støðuna og møguligar loysnir. Uppgerð yvir tørvin er eisini staðfestur, og hann er ikki hissini. Har verður sagt, at komandi tíggju árini verður neyðugt at útvega 80 búpláss. Bráðfeingistørvurin er 17 pláss og næstu árini økist hann við 19 afturat. Tørvurin er um alt landið, men mest átrokandi í Suðurstreymoy og Norðuroyggjum.

– Tá ið tað almenna byggir, er tað ofta í miðstaðarøkinum. Tað er óskiljandi, tí tað er dýrari og øll fólkini eru ikki í Havn, sigur Doris Hansen.

## Langtíðarætlan

Í farnu viku legði Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna fyri Javnaðarflokkin, uppskot til samtyktar fyri tingið um at gera eina nøktandi langtíðarætlan fyri útvegan av bústaði til fólk við serligum tørvi. Í viðmerking til lógaruppskotið verður sagt, at tað er neyðugt at gera eina langtíðar raðfesting, soleiðis at politiski myndugleikin setir sær nøkur mál, og soleiðis, at vit kunnu vera trygg við, at tað er ein miðvísur politikkur á økinum.

– At gera ein langtíðarætlan er ein gongd leið, tí sum er hendir einki. Men tað hevði gingið skjótari at útvega bústaðir um fleiri fóru í gongd, tað almenna, kommunur og fakfeløg, sigur Doris Hansen.

# 60 nýggj stovnspláss

**Nýggi barnagarðurin og útibarnagarðurin í Runavíkar kommunu geva 60 nýggj stovnspláss**

BARNAGARÐUR
*Turið Kjølbro*


*– Nýggju plássini eru ein góður bati, sigur Rodmund Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu*

Arbeiðið at gera nýggjan barnagarð í Runavíkar kommunu er nú boðið út alment. Longu 5. desember skulu tilboðini verða inni.

Nýggi barnagarðurin, sum sjálvsognarstovnurin Kongshavnar barnagarður og vøggustova eigur, verður bygdur oman fyri Toftavatn. Arbeiðið at gera økið byggibúgvið er í gongd og verður helst liðugt til jólar. Ætlanin er, at barnagarðurin, sum verður 856 fermetrar stórur, skal standa klárur at taka í nýtslu 1. januar 2003. Kostnaðarmetingin er 16,7 mió. krónur.

Verandi barnagarður í kommununi heldur til í bygninginum hjá Postverki Føroya. Postverkið hevur brúk fyri hølunum og tískil er barnagarðurin uppsagdur. Her eru 54 børn í vøggustovu- og barnagarðsaldri, men nýggi stovnurin fer at taka 90 børn í sama aldri. Umframt verður arbeitt við at gera útibarnagarð til 25 børn. Hesin heldur í fyrsta umfari til í Æðuvík, men tá ið gamli skúli í Lamba er umbygdur til endamálið, flytir útibarnagarðurin hagar, helst í seinnu helvt komandi ár.

Við hesum nýggju 60 plássunum er komið væl áleiðis at nøkta tørvin á stovnsplássum í Runavíkar kommunu. Bíðilistin er í dag 70 børn, men hann veksur alsamt eins og bíðilistin eftir grundstykkjum. Runavíkar kommunu hevur kortini ikki nakrar ætlanir um aðrar loysnir á barnagarðsøkinum.

– Nýggju plássini eru ein góður bati, hóast vit enn ikki megna at nøkta tørvin heilt. Fyribils hava vit ongar aðrar ítøkiligar ætlanir, sigur Rodmund Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu.

# Pedagogar einfaldari sáttmála

**Um eina viku skal nýggja lønarskipanin fyri allar limirnar í Føroya Pedagogfelag verða liðug og klár til undirskrivingar**

SAMRÁÐINGAR
*Turið Kjølbro*


*– Í nýggju lønartalvuna verða so allir limirnir settir av nýggjum og har í kemur lønarhækkingin, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag*

At gera eina nýggja lønartalvu fyri allar limirnar hjá Føroya Pedagogfelag, hevur verið eitt av stóru málunum, sum Føroya Pedagogfelag hevur arbeitt við. Og tíðliga týsmorgunin komu Føroya Pedagogfelag, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálastýrið ásamt um at gera eina slíka, eftir at partarnir høvdu samráðst síðani leygarmorgunin.

– Málið er at gera ein einfaldari sáttmála fyri okkara limir, við eini lønartalvu ístaðin fyri fýra. Í lønartalvuna verða so allir limirnir settir av nýggjum og har í kemur lønarhækkingin, sum verður tann sama fyri okkara limir sum hinir starvsbólkarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum hava fingið, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag.

Arbeiðast skal skjótt, tí longu 15. november skal avtalan verða liðug og undirskrivast. Partarnir sessaðust tískil við borðið gjáramorgunin at gera nýggju skipanina.

– Ein einfaldari sáttmáli er betri fyri allar partar, sigur Carita Björklund.

Forkvinnan í Føroya Pedagogfelag hevur ikki hug at gera aðrar viðmerkingar til samráðingarnar, sum hava verið, uttan, at tær hava verið harðar. Fyri tveimum vikum síðani slitnaðu tær. Semingsfólkini Gloria Kalsø og Jákup í Gerðinum komu síðani uppí.

Sáttmálin hjá Føroya Pedagogfelag fyri alt dagstovnaøkið fór úr gildi 1. mars, og ikki kann sigast annað enn, at striltið hevur gingið at fáa ein nýggjan sáttmála í lag. Veruligu samráðingarnar byrjaðu ikki fyrr enn í september, men tær bóru sum kunnugt onga leið.

Hetta er fyrstu ferð, at Pedagogfelagið hevur samráðst við kommunalar felagsskapir og Fíggjarmálastýrið undir einum. Hvørki lands- ella kommunalpolitikkarar hava víst seg undir samráðingunum ella semingsroyndunum. Hetta undrar Føroya Pedagogfelag, sum er næststørsta almenna fakfelag, almikið.



# Brúka 400.000 krónur fyri at bjarga bygdini

**Brimið hevur máað nógv burturav Bakkanum í Sumba og fyri at bjarga bygdini, er tað neyðugt at gera eina trygga verju framvið Bakkanum**

SUMBA
*Áki Bertholdsen*


*Hesi seinastu 40 árini eru í støðum 17 metrar mataðir burturav Bakkanum í Sumba. Tí er tað alneyðugt at okkurt verður gjørt fyri at tryggja bygdina ímóti at skola á sjógv*

Sumba er brimpláss burtur av og tað setir síni spor.

Hesi seinastu árini er so nógv máað burturav Bakkanum framvið sjónum í Sumba, at Bakkin nú er við at nærkast teimum niðastu húsunum óhugnaliga nógv.

Kommunan hevur sjálv arbeitt við at tryggja bakkan og tað arbeiðið heldur fram næsta ár.

Á fíggjarætlanini fyri komandi ár, er ætlanin at seta 400.000 krónur av til at verja Bakkan fyri.

Hetta varð samtykt á bygdaráðsfundi fyri stuttum.

Men kommunan er ikki fíggjarliga sterk og tí hevur hon eisini søkt landskassan um stuðul til at tryggja bakkan, men enn er óvist, hvussu verður við tí.

Kommunan hevur søkt fyrr, men tá var umsóknin ikki gingin á møti.

Í ár hevur kommunan brúkt 300.000 krónur til bakkaverju.

Umstøðurnar eru so ringar, at tað ber bara til at arbeiða í bestu summartíð. Men hevði kommunan havt einar 600.000-700.000 krónur um árið at arbeitt fyri um summari, høvdu sumbingar havt eina munadygga verju allan vegin fram við Bakkanum um eini fimm ár.

## 17 metrar farnir

Trupulleikin av, at ongin bakkaverja er, skal ikki undirmetast.

Mátingar vísa, at í støðum eru heilir 17 metrar máðaðir burturav bakkanum síðani Sumba varð matrikkulerað síðst í fimtiárinum.

Tá ið so nógv kann verða máað burturav í bara 40 ár, er tað greitt, at tað ganga ikki meiri enn 40 áfturat, fyrrenn tey fyrstu húsini eru farin á sjógv, so langt niðan undir tey niðastu húsini er bakkin nú komin.

Salvandi er rættiliga ójavnt, hvussu nógv verður matað burtur um árið.

Tað veldst alt um, hvussu árini eru. Síðst í áttatiárunum og fyrst í nítiárunum vóru vetrarnir ringir við nógvum ódnum og nógvum brimi og tað fór heilt nógv í havið. Men hesi seinastu árini hevur tað ikki verið so ringt, tí nú hevur veðrið verið betri.

## Umvæla Pollin

Umframt at verja Bakkan, ætlar Bygdaráðið eisini at brúka pening upp á at umvæla Pollin, sum lendingin í Sumba kallast.

Á fíggjarætlanini fyri næsta ár eru 150.000 krónur settar av til ymsar ábøtur í Pollinum. Eitt nú er ætlanin at stoypa og slætta tann gamla dráttin og harumframt er ætlanin at umvæla plattin, har bátarnir standa.

Men alt hetta skal takast við einum lítlum fyrivarni, tí enn er fíggjarætlanin ikki endaliga samtykt. Fyribils er semja um málið, men fíggjarætlanin skal hava eina viðgerð í bygdaráðnum afturat, áðrenn hon er endaliga samtykt.

# Koyra døgverða út til gomul og óhjálpin

**Gomul og óhjálpin í Vági kunnu nú fáa døgverða koyrdan til hús fyri ein bíligan penga**

VÁGUR
*Áki Bertholdsen*

Í Vági verður nú farið undir eina nýggja sosiala tænastu, sum fer at verða ein stór hjálp hjá nógvum eldri og óhjálpnum fólkum.Fòlk, sum eru gomul, ella á annan hátt óhjálpin, kunnu nú bíleggja sær heitan døgverða á Edrasambýlinum, so fáa tey hann koyrdan til hús.

Tað fer at kosta 30 krónur at keypa døgverðan frá Eldrasambýlinum og at fáa hann koyrdan heim

Vágs Býráð hevði málið til viðgerðar og samtykti einmælt at taka undir við tí.

Tað er nevndin fyri Eldrasambýlið, sum í samráð við Heimarøktina, hevur skotið upp at fara undir hesa tænastuna.

Byráðið skal nú gera avtalu við onkran um at koyra matin út. Býráðið skal samstundis betala fyri útkoyringina og harumframt hevur tað samtykt at standa við endan um tær 30 krónurnar ikki strekkja til.

Ætlanin er at byrja í smáum við eini royndartíð upp á einar tríggjar mánaðir fyri at vita, um undirtøka er fyri tiltakinum. Hildið verður neyvan á við tiltakinum, verða tað í hvussu so er ikki nøkur, sum fara at brúka hesa nýggju tænastuna.

Í fyrstuni er ætlanin at koyra døgverðar út einar tríggjar dagar um vikuna, men so verður tænastan útbygt, so hvørt tørvur verður á tí.

Umframt at tryggja fólki heitan døgverða hvørnn dag, verður mett, at hetta tiltakið eisini hevur ein ávísan sosialan týdning, við tað at so kemur í hvussu so er eitt fólk inn á gólvið einaferð um dagin.

# Skal í mesta lagi kosta 305 milliónir

**Uppskot um at byggja nýtt skip til suðuroyarsiglingina er nú lagt fyri Løgtingið. Endamálið við tí er at Tingið skal geva landsstýrismanninum í vinnumálum heimild at skriva undir byggisáttmála**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Nú sleppur Løgtingið eisini at siga sína hugan um ætlanin at byggja nýtt skip til suðuroyarsiglingina.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, legði mikudagin uppskot fyri tingið um at byggja nýtt suðuroyarskip.

Talan er um eina verklagsog, har hann biðjur um tingsins heimild til at skriva undir byggisáttmála um skipið.

Eftir uppskotinum skal skipið kosta í mesta lagi 305 milliónir krónur at byggja. Hetta er upphæddin, sum Knud E. Hansen, ið hevur projekterað skipið, metir, at tað fer at kosta, verður tað bygt í Evropa, Verður tað bygt í Asia, verður tað mett at verða 40-50 milliónir bíligari.

Bjarni Djurholm sigur, at endamálið við lógini er fyrst og fremst at geva Løgtinginum so stórt innlit í málið sum gjørligt og at tryggja, at málið fær eina nøktandi politiska viðgerð, áðrenn avgerðin um at fremja verkætlanina verður tikin.


*Gongur sum æltlað, verður sáttmáli um at byggja nýggja Smyril undirskrivaður um ársskiftið. Skipið skal í mesta lagi kosta 305 milliónir*

Men í øðrum lagi er tað ásett í játtanarskipanini, at tá ið talan er um størri verkløg , ið ofta fevna um fleiri fíggjarár, er meginreglan, at serstakt lógaruppskot verður lagt fyri Løgtingið. Sambært játtanarskipanini er neyðugt við serstakari lóg um byggingina, um landsstýrismaðurin skal kunna gera avtalur, sum hava við sær byggiútreiðslur í komandi fíggjarárum eisini.

Verður verklagslógin samtykt uttan seinkingar, er tíðarætlanin frameftir annars tann, at byggisáttmáli um nýtt suðuroyarskip verður undirskrivaður um ársskiftið. Síðani verður kjølurin strektur næsta summar og á sumri, ella heysti 2004 verður ferjan liðug at taka í nýtslu.

## Ótíðarhóskandi

Í uppskotinum, sum er lagt fyri tingið, hevur landsstýrismaðurin lagt eina rúgvu av upplýsingum, fyri at geva tinglimum innlit í málið.

Men um orsøkina til, at tað er neyðugt at byggja nýtt skip, verður m.a. sagt, at Smyril, sum nú er, er 32 ára gamal. Hann er uppslitin og av tí sama óálitandi tí hann hevur so nógv brek og av tí sama eisini dýrur í viðlíkahaldi.

Men hartil er hann ov lítil. Hetta hevur m.a. við sær, at akfør oftari standa eftir. Somuleiðis er tað sera trongligt á akfarsdekkinum, og hetta er óheppið fyri trygdina hjá teimum ferðandi, sum noyðast at ganga í land og umborð eftir akfarsdekkinum, serliga á Drelnesi.

Ein annar dagligur trupulleiki er hæddin á akfarsdekkinum, sum er ov lág til nýggjasta standardin av trailaralastum.

– Í hesum sambandi kann upplýsast, at Strandferðslan hevur brúkt stórar upphæddir til umvælingar og endurgjøld til skaddar lastir, og fleiri flutningsfeløg noyðast at senda flutningin á ein hátt, sum krevur meira tíð og pening til av- og áskipan, stendur í uppskotinum.